# faðirsins




## Skaðin betur farin tá hann kemur á rætta stað

Tíðin er farin frá, at sjúkrahús hava ein lækna, sum loysir allar trupulleikarnar. Í dag eru sjúkrahúsini ein eind av serlæknum, og tað er eingin, sum fyrst opererar eitt bein, so ein búk og síðani eitt høvd.

– Hetta er tíðin farin frá, og ein skaði er betur farin, um hann kemur á rætta staðið, siga teir báðir brøðurnir.

– Tess fleiri serlæknar, tess skjótari staðfesta vit sjúkuna og tess skjótari kunnu vit viðgera hana, sigur Bjarni á Steig. Hann sigur, at endamálið er ikki at verða innlagdur, men at verða so væl viðgjørdur sum gjørligt.

Bjarni hevur spesiali í blóð- og krabbameinssjúkum. Krabbameinsviðgerð er ambulant viðgerð, og tað merkir, at sjúklingarnir kunnu arbeiða um dagin og fáa viðgerð um kvøldið, heldur enn at ferðast til Danmarkar í tíð og úrtíð.

Sama er galdandi fyri økið hjá Torkil, sum hevur spesiali í nýrasjúkum, og tí kann bjóða fremstu vitan og viðgerð til nýrasjúklingar.

– Áður varð hetta viðgjørt í Keypmannahavn, og tá vóru sjúklingarnir altíð niðri. Teir høvdu einki familjulív og livdu ikki sum fólk, tí teir altíð vóru sjúklingar, sigur Torkil á Steig.

– Spesiali ger, at vit mugu vera so nógvir, men spesialiseringin ger at støðið verður lyft øgiligt, siga teir báðir yvirlæknabrøðurnir.

verið noyddur til at ásanna, tí hann hevur eisini roynt seg í øðrum fakum, og hevur aftrat yvirlæknaútbúgvingini eina útbúgving sum tannlækni.

– Eg læs til tannlækna, men føldi at eg lærdi ikki nóg mikið. Tað var bara í munninum og so ikki víðari har frá, sigur Torkil, sum tó gjørdi tannlæknaútbúgvingina lidna meðan hann læs til lækna.

– Eg var nokk mest tannlækni av navn enn av gavn, heldur Torkil fyri.

Læknaútbúgvingin var heldur ikki tann fyrsta, Bjarni fór undir. Hann læs verkfrøði í eitt ár, men valdi so at skifta verkfrøðilesnaðin út við læknalesna í staðin.

– Eftir student arbeiddi eg nakað, og gjørdist áhugaður í verkfrøði. Men aftanfyri onkustaðni hevur helst ligið ein dreymur um at gerast lækni, ásannar Bjarni.

Nú teir báðir í síðsta gjørdu av at gerast læknar, kann tað kanska undra onkran, at teir ikki arbeiða uttanlands, har fakliga avbjóðingin er nakað størri enn her heima.

– Vit eru føroyingar og vilja vera her. Kunnu vit virka professionelt í Føroyum, ja so er tað næstan endamálið við útbúgvingini, sigur eldri yvirlæknabróðurin.

### Fyrsta og seinasta árið

Nú virka teir tríggir, faðir og synir, undir sama taki á Landssjúkrahúsinum. Eftir arbeiðstíð slepst ikki undan, at teir eisini eru saman. Tí er lætt at hugsa, at tað kanska skapar trupulleikar í forholdinum millum tað privata og professionella. Tað hevur tó ikki verið støðan hjá teimum og Torkil sigur, at teir beinanvegin fingu sett eina linju ímillum.

Tá tað er sagt, er ógvuliga nærliggjandi at spyrja, um pápin kanska hevur givið synum sínum okkurt gott ráð á vegnum – privat sum professionelt – tá teir fóru undir lesnaðin.

– Eg bað teir ikki lesa til lækna, sigur Jón á Steig við einum álvarsomum tóna, men smílist skjótt aftur og sigur so flennandi, at tað hevur hann ikki sagt.

Tað var tann 1. januar í ár, at Bjarni og Torkil fingu starv sum yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum, og soleiðis gjørdust tað tríggir yvirlæknar við eftirnavninum á Steig á Landssjúkrahúsinum.

1. januar komandi ár verður støðan ein onnur. Tá fer Jón á Steig frá fyri aldur, so árið í ár er fyrsta og einasta árið, har Jón, Bjarni og Torkil á Steig allir virka sum yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum.